

# SÁLMUR 23

HARRIN er hirði mín;
mær fattast einki.

Hann letur meg liggja
á grønum eingjum,
leiðir meg at hvíldarvøtnum;

Hann lívgar sál mína,
Hann leiðir meg
eftir røttum leiðum
– fyri navns Síns skuld.

Um eg so skal ganga
í dali deyðaskuggans,
óttist eg einki ilt;
tí Tú ert við mær,
keppur Tín og stavur Tín,
teir ugga meg.

Tú borðreiðir fyri mær,
beint fyri eygum fígginda mína;
Tú salvar høvd mítt við olju;
tað rennur út av steypi mínum.

Einki uttan gott og náði
skal fylgja mær,
allar dagar eg livi,
og eg skal búgva
í húsi HARRANS allar ævir.

